# BØNARLØTAN

**Oktober** **2019** **34. árg.**

*1. Týsdagur* *1.Kong. 17.1-24*






**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 12, Svend 11, Terji 7, Petra 5**

Í nov. ferðast vit kring oyggjarnar í sambandi við nýggju fløguna „Bønarhendur". Biðið, at Harrin frelsir og endurnýggjar, og at mong verða uppbygd.

## KRINGVARPIÐ

| | |
|---|---|
| 6. okt. | Sjónvarpsandakt, Jákup Eli Østerø |
| 27. okt. | Sjónvarpsandakt, Jákup Eli Østerø |
| 27. okt. | Sjónvarpsmøti úr Ebenezer, Tórshavn |

## R7 (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## RUMENIA



3. okt. fara Billy og Jóna Hansen, Páll Mørkøre, Katrin Østerø og Birgir Andreasen til Rumenia at boða evangeliið. Toymið vitjar barnaheimið Betania í Uricani, privat heim, samkomur og býin Tirgu-jiu, har 100.000 fólk búgva. Har í økinum vitja vit eisini fleiri sigoynarasamkomur og halda møti bæði inni og úti. Alina Juliana skal doypast 7. okt. Hon hevur verið tulkur hjá toyminum í nærum 10 ár og kom til persónliga trúgv fyri 6 árum síðani. Biðið um varðveitslu á ferðini, og at Harrin opnar hjørtuni.

## OM

Fyrst í okt. fer **Mirjam Glerfoss** til Belgia at virka við OM í 2 mánaðir. **Gunnvá Áargarð** fer eisini á stevnu í Belgia, sum liður í at fyrireika styttri missiónstúrar komandi ár.

## *2. Mikudagur* *Sálm. 67.1-68.12*



**DANMARK, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 12, Andreas 10, Kristina 8**

Vit gleðast um, at nógv fólk hittast aðruhvørja viku í húsbólkum at lesa og granska Orð Guds og at biðja saman. Síðsta mánakvøld í hvørjum mánaði er bønakvøld í Kristnastovu; tá verður eisini ringt og prátað við onkran trúboðara. Vit fyrireika árligu leguna í Nordsjællands Efterskole 17. - 20. okt. Símun Absalonsen hevur bíbliutímarnar.

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 10**

Vit hava nú longu verið í USA í 2 mánaðir. Alan er byrjaður at lesa her í býnum, og dámar honum væl. Ryan gongur í lítlum skúla nær við. Eg og Marion fara suður á venjingarskúlan hjá NTM í Missouri 2. - 4. okt. Har er „Field Fair“, sum upplýsir næmingarnar um ymisku møguleikarnar í tænastu. Vit skulu umboða Vesturafrika. Biðið um trygd á langa koyritúrinum.

⋆ Í dag fyllir Karina Tutty 18 ár

## *3. Hósdagur* *1. Kor. 15,1-19*

**ZAREPTA**
**Maria á Lakjuni Simonsen, Jákup N. Olsen, Jens Bech**

Vit hava upplivað hjálp og trúfesti Harrans í tænastuni. Haldið á at biðja nú hjúnastevna II, 4. - 6. okt., og heystlegan, 15-17 ár, 11. - 16. okt., eru eftir.

⋆ Í dag fyllir Nana Mortensen 8 ár



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 15, Rebekka 14, Hanna 11**

Fyrst í okt. fara vit aftur til Filipsoyggjar. Ætlanin er at søkja um varandi uppihaldsloyvi, tá vit koma til Manila. Tí er neyðugt at verða í Manila í umleið 3 vikur, áðrenn vit fara víðari til Palawan. Nógv skjøl skulu avgreiðast fyri at fáa tílíkt uppihaldsloyvi, og tað kann ofta verða trupult.



**FØROYAR**
**Khuldah og Sámal Mikkelen**
**Josva 10, Ester 8, Samuel 5**

Vit eru farin undir nýggja tiltakið „Didasko“, tvs. „eg læri“, fyri ung í 7. flokki. Vit møtast í Betesda hvønn mikumorgun. Endamálið er at læra grundleggjandi lærusetningar í kristnu trúnni. Biðið, at tey vaksa í trúnni og styrkjast í samfelagi hvørt við annað. Biðið eisini, at eg fái náði og vísdóm at hjálpa teimum andaliga.



**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**



## *5. Leygardagur* *1. Kor. 15.20-38*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit hava avlýst ferðina til Europa, tí Óli hevur fingið eldkast (herpes zoster), sum kann vera drúgv sjúka. Ongin ferð er í umbúna í okt., tí fyrireikar Óli seg til túrin til Asia í nov.

## *6. Sunnudagur* *1. Kong. 18.22-46*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
John fer til Kasakstan og tvey onnur grannalond at tala og læra tey trúgvandi. Tey kristnu her fara ígjøgnum torførar tíðir. Meginparturin í hesum londum eru muslimir.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 15, Victoria, 13,**
**Emma Grace 11, Jónatan 9,**
**Markus 7, Evita 4, Joy 2**
Tiltakið 14. sept. var væl eydnað. 25 fólk komu at hoyra evangeliið. Biðið, at sáðið fellur í góða jørð og ber ávøkst.

## *7. Mánadagur* *1. Kor. 15.39-58*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

Fyri okkum „gomlu“ er tað ein gleði enn einaferð at síggja ungar, trúgvandi útisetar, sum nýliga eru komnir til Danmarkar í útbúgvingarørindum, savnast til møtini í Kristnastovu. Latið okkum biðja, at teir verða varðveittir í trúnni. Andaktsbókin „Ein dag í senn“ hevur verið væl móttikin millum fólk, og vit nýta hana ofta í sambandi við vitjanir okkara. berghamar@kristnastova.dk

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 16**

⋆ Í dag fyllir Jónatan Tuohy 10 ár

## *8. Týsdagur* *1. Kong.19.1-21*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 2, Timon 0**

Vit biðja nú um at fáa innfararloyvi til PNG til yngra barnið. Hinir báðir menninir í toyminum hava evnað timbur til í Kovol. Eg fari at hjálpa teimum at byggja okkum og starvsfelaga hús, tá vit koma hagar um miðjan okt. Biðið um trygd, og at byggingin skal ganga væl.



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *9. Mikudagur* — *Sálm. 68.13-36*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam Joy 15, Noah 13,**
**Lydia Sigrid 2**

Eitt vaksandi tal av fólki, sum ikki kenna okkum ella hava verið í okkara samkomu, finna okkum nú ofta á netinum; tey ringja og biðja um samtalu. Biðið, at vit møta teimum við lurtandi oyra, vísdómi, samkenslu og eisini megna at kunngera teimum boðskapin um Jesus.

## *10. Hósdagur* — *1. Kor. 16.1-24*



**FØROYAR, ONGLAND**
**NTM, North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen**

Í okt. vitja vit bæði í Betesda í Klaksvík og í Nebo og Berøa í Eysturoynni. Síðst í okt. vitja vit eisini samkomur í Suðuroynni saman við Símun Pæturi á Torkilsheyggi. 20. - 23. okt. verða vit í Betania í Porkeri og 24. - 27. okt. í Vitninum í Hvalba.

## *11. Fríggjadagur* — *1. Kong. 20.1-25*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Takk fyri ógloymandi ferð í Føroyum! Eg havi verið í Rumenia til nýggja bíbliuútgávu fyri deyv. 20. - 25. okt. eri eg í Noregi á stevnu hjá DMI. 30. okt. - 6. nov. fari eg til Estlands á bíbliutýðingarstevnu.

## 12. Leygardagur 1. Hebr. 11.20-40



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Heilsustøðan hjá Annu er framvegis rímiliga góð. Hon hevur í huga at umseta fleiri føroyskar sangir til enskt. Í løtuni umsetir hon „Harrin er mín hirði góði…“ eftir Brynleif Hansen. Seinnapart mikudag hevur hon samfelag við onnur, ið ikki arbeiða. Hon gevur altíð fólki nýtt mót. Dubby ger læruupptøkur, eisini til saafi fólkið í Senegal.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## 13. Sunnudagur 1. Kong. 20.26-43



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

15. sept. gingu vit endaliga frá leguhúsunum fyri veturin. Tað var við stórum takksemi til Harran fyri hetta leguárið. Vit vóna at byrja regluligu barnamøtini aftur í okt. og, um vit orka, eisini eitt ungdómsmøti. Ynski okkara er eisini at vitja grannabygdirnar av og á og hava samband við legubørnini; men um hetta skal eydnast, so má onkur koma at hjálpa okkum eitt hóskandi tíðarskeið.



**PAPUA NÝGUINEA**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 11, Noah 10, Karis 6,**
**Judah 4, Ethan 2**

## *14. Mánadagur* *Hebr. 12.1-11*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen,**
**Cecilie 16, Kristian 14**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð,**
**Liljan 13, Leanne 12, Luckas 0**

15 ung vóru á ungdómsmøti síðst. Filip undirvísti um Adam og Evu. Í sunnudagsskúlanum eru 5-7 børn. Biðið, at barnamøtinin skjótt kunnu byrja aftur. Vit eru sera fáment.

**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

## *15. Týsdagur* *1. Kong. 21.1-29*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Biðið fyri vetrartænastuni, nú vit ætla at hava bíbliutímar heima hjá okkum, hava samrøður og biðja fyri fólki. Vit biðja eisini, at Qaamaneq kann verða tikin upp á land her í Qasigiannguit, men bryggjan má umvælast fyrst; annars noyðast vit at fara til Aasiaat, har tað er væl dýrari at hava bátin um veturin.

**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 17, Megan 14, Trisha 7, Emma 3**

## *16. Mikudagur* *Sálm. 69*



**FØROYAR**

**Rutt og John í Skemmuni**

Eg luttaki á møtum og útimøtum í Suðuroynni og á regluligum andaktum á sjúkrahúsi og ellisheimi á Tvøroyri. Biðið fyri tænastuni í Íslandi og á Ástjørn, sum vit hava vitjað. Ynski okkara er at halda á í tænastuni at vitja menniskju og samkomur kring landið.

**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**
**– Birgit og Svenning av Lofti**

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *17. Hósdagur* *Hebr. 12.12-29*

**SVEIS, Nyon, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 6, Micah 6**

Nýggir elstar verða nú settir í Redeemer Grace. Biðið fyri teimum og samkomuni! Okkum tørvar sunnudagsskúlalærar-ar. Biðið, at vit fáa fólk við slíkum gávum. 1. - 3. nov. verður samkomulega i Jurafjøllunum. Vit gleða okkum ómetaliga og biðja, at hon verður til signing.

**IRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty, Karina 18**

## *18. Fríggjadagur* *1. Kong. 22.1-28*



**TÝSKLAND, Hückeswagen,**
**Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen,**
**Noah Elias 7**

Vit hava í løtuni 24 stutttíðar trúboðarar, ið eru sendir út frá Ethnos 360 í Týsklandi, og sum hjálpa trúboðarum í øðrum londum í eitt ár. Um Gud leggur tær á hjarta at brúka eitt ár í hansara tænastu, so kanst tú venda tær til okkara. Tørvurin er stórur í nógvum londum.

## *19. Leygardagur* *Hebr. 13.1-25*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Skúlin hjá Anniku byrjar aftur seinast í okt. í Onglandi. Hetta verður eftir ætlan seinasta árið. Biðið, at tað skal ganga væl við lesnaði og starvsvenjing. Ímeðan verður Stephen í Turkalandi. Í aug. hjálptu vit til í Istanbul á BCC og í ISTHOP bønarhúsinum. Vit vitjaðu fólk.



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 13, Rebekah 11, Lydia 9**



**FILIPSOYGGJAR, Manila, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

★ Í dag fyllir Ester Grace Mikkelsen 9 ár

## *20. Sunnudagur* *1. Kong. 22.29-54*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 11**
Biðið fyri trúarverjutænastuni, undirvísingini og átakinum á alnótini bæði á føroyskum og enskum og fyri møtunum fyri framman.
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 12**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
⋆ Í dag fyllir Debora Christiansen 4 ár

## *21. Mánadagur* *Jónas 1.1-16*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 8, Leah Ève 5, Abigail 0**
Minnist ungdómsarbeiðið. Slagorðið er: trúgv, lær og tæn! Okkara húsbólkur hittist í heimi okkara – í løtuni tríggjar familjur í ein útnyrðing úr Nantes. Minnist eisini evanglisku møtini „j'pense" í Nantes – at mong koma at kenna Harran.

## *22. Týsdagur* *2. Kor.1.1-24*



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**
Skúlaárið byrjaði 16. sept. Biðið fyri næmingunum, at Harrin virkar í lívi teirra, og at teir í enn størri mun fata, hvussu stórur Harrin er.
⋆ Í dag fyllir Sarah Mortensen 9 ár

## *23. Mikudagur* *Sálmur 70 og 71*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Sjálvt um okkara arbeiði ikki beinleiðis er treytað av at duga italskt, so hevði tað verið ein stór hjálp at duga tað betur.

## *24. Hósdagur* *Jónas 2.1-11*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 10, Nana 7, Louie 5, Rio 0**

Síðan árskiftið hevur Shino havt regluligar bíbliutímar við kvinnu, sum vil vita meira um bíbliuna og kristnu trúnna. Biðið, at Shino kann greiða henni frá evangeliinum, at og hon kemur til trúgv.

★ Í dag fyllir Natan Christiansen 1 ár

## *25. Fríggjadagur* *2. Kor. 2.1-17*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Tað gekk væl at fáa sólpanelini til bygdina og at seta tey upp. Tað er gott aftur at hava nóg mikið av streymi. Hendan mánaðin og part av næsta eri eg longur eysturi í landinum á gestaheimi hjá NTM og geri kladduna til Hebrearabrævið, og um tíð verður okkurt annað av stuttu brøvunum. Ongin í toyminum er í bygdini í løtuni. Erik og Wendy eru farin til USA í brúdleyp og Rebekka er á skeiði á Fílabeinsstrondini. Tey verða aftur um miðjan nov. Biðið, at vit eisini fáa nóg mikið av regni, so grøðin búnast á akrunum.

## *26. Leygardagur* *Jónas 3.1-10*

### USA, Nebraska, Ethnos 360
### Rachel og Peter Hansen, Caleb 17

Síðan juli hevur Caleb fingið hjálp fyri tunglyndi, og nakað av bata er at síggja. Karl hevur enn ikki fingið arbeiði. Arbeiðið við loyvum og váttanum hjá trúboðarum er krevjandi og drúgt; tí tørvar okkum vísdóm í tænastuni.

## *27. Sunnudagur* *2. Kor. 3.1-18*



### MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
### Inga McKendry

Vit halda á at rættlesa Ápostlasøguna, so umsetingarráðgevi kann meta um úrslitið. Biðið, at samkomuleiðarar síggja tørvin á at brúka mixtec málið á møtunum. Vanliga er alt á sponskum.

### VENESUELA, Puerto Ordaz
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen



**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Lea Wolles, Jónvør Christiansen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang, Óli Jákup Jacobsen.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.

## *28. Mánadagur* *Jónas 4.1-11*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Mikudagin 13. nov. kl. 11 verður frokostmøti í Skovlunde Frikirke. Karl-Jørgen Helmich kemur at tala um at lata seg fylla av Heilaga Andanum.

## *29. Týsdagur* *2. Kor. 4.1-18*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 14, Aron 7, Noah Kristian 5**

Fyri at kunna tæna trúboðarum enn betur eru vit farin í samráðingar um at opna eina skrivstovu afturat, hesuferð í Bangkok.

## *30. Mikudagur* *Sálm. 72*

**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 8, Tabita 5, Debora 3, Natan 0**

Biðið fyri næmingunum í trúboðaravenjing og lærarum teirra!

**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk
**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**Godnathistorier fra Bibelen**

**200 kr.**




Nýggj bók frá Scandinavia við 10 søgum úr Bíbliuni, sum foreldur kunnu lesa fyri børnum sínum. Frásagnirnar eru stuttar við litríkum myndum. Søgugongdin er løtt at skilja, og søgurnar enda væl. Tí eru tær væl egnaðar at lesa á kvøldi!

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos